# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 4. mars 2010

# Kvinnulandsliðið endaði aftast

**Tað eydnaðist ikki kvinnulandsliðnum at fáa nakað burtur úr síðsta dystinum ímóti Eysturríki, hóast tað stóð á jøvnum í hálvleikinum og tí endaðu Føroyar aftast í sterku kappingini í Algarve í Portugal**

einslistir@kallnet.fo



Hilmar Jan Hansen

Eftir at hava tapt allar tríggjar dystirnar í bólkaspælinum í Algarve Cup ímóti Portugal, Rumenia og Eysturríki, spældu Føroyar seinnapartin í gjár aftur ímóti Eysturríki, nú plaseringarnar tvørtur um allar tríggjar bólkarnar skuldu avgerast. Hetta var dysturin um 11. plássið í kappingini, ið tilsamans fevndi um 12 landslið.

Tíverri gjørdist endin hjá føroysku kvinnunum eitt stórtap, tí Eysturríki vann 6-0, eftir at tað hevði verið 0-0 í hálvleikinum. Í fyrra hálvleiki spældu føroysku kvinnurnar væl og høvdu eitt nú eini tvey vandamikil fríspørk uttan fyri eysturríkska brotsteigin. Men spurningurin var so, um orkan fór at røkka til síðstu trý korterini, tí nú vóru tær føroysku blivnar nakað moyrar.

Á regnváta vøllinum José Arcanjo Stadium í Olhão vísti tað seg tó ikki at bera til at halda stand eftir steðgin, og bara fáar minuttir inn í seinna hálvleik hevði Eysturríki lagt seg á odda 1-0, og so fór tað bara at ganga ein veg. Mitt í hálvleikinum fóru trý mál ígjøgnum eftir bara fimm minuttum, áðrenn eysturríksku kvinnurnar ímóti endanum fingu tvey mál aftrat og sostatt vunnu stórt.



– Framstig eru gjørd í spælinum fyri hvønn dyst, sjálvt um vit bara hava tapt, men hetta er so nógv sterkasta mótstøða, vit nakrantíð hava fingið í einari kapping, sigur Álvur Hansen, landsliðsvenjari Savnsmynd: FSF

### Framstig hóast tap

– Framstig eru gjørd í spælinum fyri hvønn dyst, sjálvt um vit bara hava tapt, men hetta er so nógv sterkasta mótstøða, vit nakrantíð hava fingið í einari kapping, staðfesti Álvur Hansen, landsliðsvenjari, eftir seinasta dystin á Portugal-ferðini, áðrenn farið var at hyggja at finaluni millum Týskland og USA.

– Fyri okkara viðkomandi er henda tíðin á árinum kanska ikki tann besta til kapping, tí okkara egna kapping er jú ikki í gongd. Vit hava tó roynt at vant so nógv, sum møguleiki hevur verið fyri, men tíverri hevur kavin darvað venjingini nú í longri tíð, so vit hava ikki verið so nógv á vøllinum, sum vit kundu ynskt okkum.

Sjálvt um úrslitini ikki vóru til vildar niðri í Algarve, so heldur landsliðsvenjarin, at spælararnir kortini hava fingið nakað burturúr, tí liðið í meiri enn eina viku hevur verið í einum professionellum umhvørvi saman við heimsins bestu kvinnuligu spælarum.

– Upp á henda mátan kunnu okkara spælarar í øllum førum síggja, hvat skal til fyri at gerast enn betur, sigur Álvur Hansen.

### Algarve Cup 2010

| | |
|---|---|
| **Finalan** | |
| Týskland-USA | 2-3 (1-2) |
| **Bronsufinalan** | |
| Kina-Svøríki | 0-2 (0-1) |
| **5. pláss** | |
| Danmark-Norra | 2-1 (0-0) |
| **7. pláss** | |
| Finnland-Rumenia | 0-1 (0-1) |
| **9. pláss** | |
| Portugal-Ísland | 0-3 (0-0) |
| **11. pláss** | |
| Eysturríki-Føroyar | 0-6 (0-0) |

## USA vann – sum vanligt

Algarve Cup er ein kapping, sum er høgt í metum millum heimsins fremstu kvinnulandslið í fótbólti, og ikki minst eru tey í USA sera glað fyri kappingina, sum hevur verið í Portugal á hvørjum ári síðani 1994. Ein orsøk til tað er sjálvandi, at USA hevur vunnið kappingina oftast av øllum, sjey ferðir.

Hesa ferð var heldur einki undantak, tí USA vann í finaluni á Týsklandi, sum bara eina ferð hevur vunnið kappingina. Hetta eru annars tvey tey bestu kvinnulandsliðini í heiminum í løtuni, so tað var vorðið sum fongur hjá føroyska kvinnulandsliðnum at sleppa at síggja finaluna teirra millum í gjár.

Annars hava Norðurlond gjørt vart við seg í kappingini, serliga tey fyrstu árini. Norra hevur vunnið hana fýra ferðir og Svøríki tríggjar ferðir, eitt nú í fjør, meðan Danmark hevur verið fimm ferðir í finaluni, men enn eigur fyrsta sigurin til góðar har.

Millum heimsins fremstu fótbóltstjóðir í kvinnuhøpi er prestisja í at vinna Algarve Cup, sum í nógvar mátar verður sammett við at vinna olympiskt gull ella at gerast heimsmeistari. At tað so enntá er eydnast at fáa Føroyar upp í »góða selskapið«, ið telur so góð landslið, er eitt satt bragd, og vónandi býðst høvið aftur.

hil

---

## Mjølnir-ÍF 3-0 (25-11, 25-15, 25-16):

# ÍF spælir dag um dag

Nú kappingin í Eik-liguni hjá monnum nærkast endanum, er dystarskráin eitt sindur spjaddari enn vanligt. Eitt nú spældi ÍF í gjárkvøldið ímóti Mjølnir og skal aftur í kvøld klokkan 20.30 spæla ímóti SÍ. Dysturin í kvøld er tann, ið var útsettur frá leygardegnum, og av tí at ÍF ikki sleppur av aftasta plássinum, hevur dysturin ikki so stóran týdning fyri fuglfirðingar kortini.

Einasta, ið eftir er at spæla um, er møguligi triði finaludysturin millum Mjølnir og SÍ. Í løtuni er SÍ fimm stig frammanfyri, men hevur spælt tveir dystir fleiri, so tann spenningurin verður nokk avgjørdur, tá liðið hittast í Klaksvík um góða viku.

Í gjárkvøldið hevði Mjølnir vitjan av ÍF, ið heldur ikki hesa ferð fekk sett ella stig. Í veruleikanum var talan um eina avsmurning, tí hóast Mjølnir fyri tað nógva spældi við sterkastu uppstilling, var ikki neyðugt at spíla seg út fyri at vinna. Móttøkurnar hjá ÍF riggaðu illa, og tí spurdist heldur einki álop burturúr.

hil

### Flogbóltur

**Eik-ligan, menn**

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 17 | 14 | - | 3 | 44 | 16 | 28 | 21 |
| 2 | SÍ | 15 | 11 | - | 4 | 37 | 20 | 17 | 16 |
| 3 | Fleyr | 16 | 6 | - | 10 | 32 | 35 | -3 | 8 |
| 4 | ÍF | 16 | 0 | - | 16 | 3 | 45 | -42 | 0 |